

*Henrik Pedersen er annað árið á rað føroyameistari í billard*





*Bjarni Skaalum royndist drúgvur, men hann mátti at enda geva seg í dystinum*

*Bronsan í ár fór til veteranin, Jan Müller, sum framvegis veit, hvussu køin skal sveiggjast*



*Kristian Sune Høgnesen fekk bæði besta umfarið og besta spælið*



*Liðið hjá Havnar Klubba, sum herfyri tryggjaði sær gullið í liðkappingini*

# Einki at spæla fyri

**Teir báðir seinastu dystirnir í meistaradeildini hjá monnum, ið vóru leiktir leygardagin, høvdu ongan týdning**

FLOGBÓLTUR

*Terji Nielsen,*
*terji@sosialurin.fo*

Endaumfarið í flogbóltskappingini hjá monnum hevði ongan serligan áhuga millum manna. Tveir dystir vóru á skránni, og vóru teir millum ávíkavist Mjølnir-ÍF í Klaksvík og Fram-Fleyr í Hoyvík. Greitt var frammanundan, at SÍ var meistara, og at Mjølnir vann silvurið, meðan Fleyr fekk bronsuna.

### Greiður sigur til Mjølnir

Mjølnir og ÍF hittust eisini í fjør á seinasta leikdegnum, men í mun til í ár, so var dysturin í fjør avgerandi fyri, hvør fór avstað við meistaraheitinum.

Soleiðis var ikki í ár, men Mjølnir gjørdi sína skyldu og staðfesti, at teir framvegis teljast millum bestu flogbóltsliðini í landinum. Klaksvíkingar vunnu ein greiðan 3-0 sigur, og munurin var týðuligur í øllum trimum settunum.

Settúrslitini vóru 25-16, 25-13 og 25-18 til Mjølnir, sum harvið staðfesti silvurplássið hjá sær.

Hin dysturin í seinasta umfarinum var leiktur leygarkvøldið í Hoyvíkshøllini, har tey bæði havnarfeløgini Fram og Fleyr dystaðust. Bronsuvinnararnir úr Fleyr høvdu munin, og teir vunnu dystin 3-0.

# Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mjølnir | 20 | 17 | - | 3 | 53 | 16 | 37 | 25 |
| 2 | TB | 20 | 17 | - | 3 | 53 | 22 | 31 | 25 |
| 3 | Dráttur | 20 | 11 | - | 9 | 43 | 33 | 10 | 18 |
| 4 | ÍF | 20 | 9 | - | 11 | 33 | 37 | -4 | 14 |
| 5 | KÍF | 20 | 5 | - | 15 | 19 | 48 | -29 | 6 |
| 6 | SÍ | 20 | 1 | - | 19 | 13 | 58 | -45 | 2 |

Meistaradeild, menn

| | | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | SÍ | 16 | 15 | - | 1 | 46 | 12 | 34 | 23 |
| 2 | Mjølnir | 16 | 11 | - | 5 | 38 | 20 | 18 | 16 |
| 3 | Fleyr | 16 | 9 | - | 7 | 31 | 29 | 2 | 13 |
| 4 | ÍF | 16 | 4 | - | 12 | 19 | 39 | -20 | 7 |
| 5 | Fram | 16 | 1 | - | 15 | 12 | 46 | -34 | 1 |